# Bygdaráðið

**Almenni Bygdaráðsfundurin 05.11.2007**

**Mál nr.  110/2007 Byggimál.**

Byggiloyvi til tær 5 íbúðirnar hjá Timburhandlinum úti á Kvíggjarheyggi.
Højgaards Handilsvirkið hevur á fundi við kommununa í dag latið tekningar v.m. av ætlaðu byggingin til kommununa.

Tekniska nevnd mælir til, at projektið hjá Højgaards Handilsvirkið heldur fram.

Tilmælið frá Teknisku nevnd var samtykt.

Tann 08.10.2007 var framløga av projektinum á Svangaskarði, har Nes kommuna, Borg, JHR, Føroya banki og Meklarafelagið Skyn vóru við. Brøv vóru send út til 50 fólk sum standa á bíðilista hjá Nes kommunu, men grunda á lítlu uppmøtingina, hevur verið tosað um, hvat skal gerast. Stigtakarnir hava hug at marknaðarføra projektið alment. Nes kommuna hevur sagt, at tað hevur kommunan einki ímóti, men vísur tað seg, at fólk eru áhugaðið, sum standa á bíðilista hjá kommununi, skulu tey fáa fyrsta rætt, men við stuttari freist.

Tekniska nevnd mælir til at tikið verður undir við hesi skipan.

Avgerð. Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr.  111/2007 Vaktarskipan.**

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur nú undirskrivað avtaluna um vaktargjald fyri Tofta Havn.

Avtala um vaktarskipan fyri Nes Kommunu

Vaktarskipanin er fyri teir tímar, sum liggja uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá havnarskrivstovan er stongd.

Vaktin skal samskipast við aðrar fakbólkar í kommununi. Vaktin fevnir um niðanfyristandandi kritisk øki í  kommununi: At hava eftirlit við-

- Havnarløg
- Vatnleiðingar
- Kloakkskipanir
- Reinsiverk
- Ognir hjá kommununi
- Ymiskar átrokandi tænastur til borgarar

Hvørt vaktartíðarskeið strekkir seg yvir 7 dagar. Fyri hvørjar 7 dagar verða goldnar vakthavandi 1.500 kr. í samsýning fyri at verða tøkur, og at svara telefonini. Talan er í hesum sambandi um eina ikki eftirlønargevandi vakt.

Er neyðugt at rykkja út, verður víst til grein 3, stk. 4 og 5 í sáttmálanum millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**§3**

**Stk. 4.** Um arbeitt verður yvir millum kl. 00.00 og 07.00 á morgni, so skal verða goldið fyri minst 2 tímar, og millum kl. 07.00 og 24.00 fyri í minsta lagi 1 tíma.

**Stk. 5.** Yvirtíð I er fyri 1., 2. og 3. tíman og er 1/2080 av vanligu árslønini á avvarðandi lønarstigi + 50%. Yvirtíð II verður goldin fyri 4. tíman og eftirfylgjandi tímar, sunnu- og halgidagar og teir í grein **7** nevndu frídagar og er 1/2080 av vanligu árslønini á avvarðandi lønarstigi + 100%.

Hendan avtala kemur í gildi tann 1.oktober 2007.

Avtalan kann av øðrum ella báðum pørtum sigast upp við 3 mánaða ávaring, tó fyrstu ferð til tann 1. oktober 2010.

Tórshavn, tann xx/10-2007

| | |
|---|---|
| **Føroya Skipara- og Navigatørfelag** | **Kommunala arbeiðs-gevarafelag Føroya** |
| Eyðstein Djurhuus | Heðin Mortensen/ Anita Fuglø |
| Regin Nónstein | |

**Nes Kommuna**
Símin Johannesen, borgarstjóri

Tekniska nevnd mælir til, at bygdaráðið tekur undir við og samtykkir hesa vaktarskipan, til at vera galdandi fyri Tofta havn, at koma í gildi 1. nov. 2007 ella tá avtala er gjørd millum kommununa og teir persónarnar sum skulu vera við í hesi vaktarskipan.

Fíggjarnevndin tekur undir við hesi vaktarskipan og tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

Avgerð: Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 112/2007 Byggimál l**

Tekniska deild hevur fyngið fyrstu umsóknina um at stoypa garð tvørtur við Gaddavegnum, Tekn. Deild vil hava felags ásetingar fyri alt hetta økið.

Omanfyri vegin standa húsini frá 1,5 m og upp til 3 m omanfyri veghædd, alt eftir skapi av húsum, og hvussu lendið sær út. Fyri tey flestu koma útkoyringar at fylgja lendinum.

Henda fyrsta umsóknin ljóðar t.d. uppá at stoypa garðin 1,7 m høgan, men sambart byggisamtyktini skal garður, lendi, gyrðing ella planting v.m. ikki verða hægri enn 1 m. Hetta fyri, at útsýnið skal verða í lagi, har útkoyringin er.

Vit kunnu geva loyvi, sum sigur, at garður ikki verður hægri enn 1 m, men ofta er avgrevstur v.m. nógv hægri enn garðurin, so vit mangla orðingar í byggisamtyktini sum siga hvussu langt inn frá vegnum hesin 1 m skal verða. Hjáløgd er tekning.

Á Síðu 18 og 19 í byggisamtyktini standa nakrar linjur hesum viðvíkjandi, og leggur hesin teksturin upp til, at byggivaldi tekur støðu til, hvussu hesar ásetingar kunnu verða fyri hesi ymisku økini.

Tekniska nevnd mælir til, at garðurin skal vera 1 metur høgur og at plantingin skal vera í minsta lagið 1 metur inn frá garðinum.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 113/2007 Ymisk Havnamál.**

1)
Sea-Star hevur kontakta Teknistovuna og boða frá, at teir ynskja glasveggin og útbygningin tiknan aftur inn í høllina sum ein útbygning á suður/vestur horninum.

Tekniska nevnd mælir til, at halda fast við fyrr gjørda samtykt og at glaspartíðið ikki skal koma longur suður ella vestur enn sjálv høllin kemur.

Avgerð. Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

2)
Økið inni á Rætt.
Í tilboðnum frá J&K. Petersen, skuldi ein planki leggjast niður á helluna, uppi á kantinum fram við berginum á havnaøkinum, sum avslutningur til skráan niðan móti landsvegnum.
Í tilboðnum var hetta mett at kostað 30.000,00 kr.
Nú biður J&K Petersen um at sleppa undan at leggja henda plankan fram við kantinum, men lata avslutningin vera sum hann er í dag, móti at teir lækka tilboðið við 40.000,00 kr.

Tekniska nevnd mælir til at tikið verður av hesum tilboðið, tí mett verður, at verandi kantur væl kann góðtakast og tí ætlaða vegaføringin sum skuldi vera fram við "berginum" omanfyri bygningarnar, nú er flutt til at vera millum bygningarnar á økinum Rætt- Saltnes.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 114/2007 Mentamál.**

Nes kommuna keypti síðsta ár bøkurnar "Føroyar í dag" frá forlagnum Printskill Ltd í Íslandi.
24.10.2007 kom umsøkn um at útgeva eina bók har allar bøkurnar eru í einum -Føroyar, Ísland og Grønland í dag-. Bókin verður útgivin í fleiri londum, og verður her serliga dentur lagdur á at bókin skal nýtast sum undirvísingartilfar um londini í útnorði.
Ætlanin er í fyrsta lagi at prenta 10.000 bøkur, har biðið verður um stuðul uppá 5,00 kr pr.bók t.v.s. 50.000 kr.
Nes kommuna verður nevnd við heimasíðu og tilíkt.
Um kommunan sjálv skal keypa bøkur, fáast tær fyri ½ prís t.v.s 200 bøkur kosta 50.000 kr.

Mentunarnevndin mælir til at keypa 30 bøkur fyri 7.500,00 kr. t.v.s. bøkur til ein skúlaklassa, og kunnu bøkurnar sostatt brúkast í undirvísingini.

Fíggjarnevndin staðfestir, at Mentunarnevndin ikki hevur tikið støðu til stuðulin uppá 50.000,00 til sjálva útgávuna av 10.000 bókum, sum viðførir, at kommunan ikki verður nevnd í útgávuni.
Fíggjarnevndin mælir frá at veita nakran stuðul til útgávuna, og tá kommunan ikki ger tað, mælir Fíggajrnevndin tí heldur ikki til at keypa nakrar bøkur, tí keypur kommunan ikki 200 bøkur, so skal kommuna gjalda fullan prís.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 115/2007 skúlamál</u>**

Tofta skúli hevur lagt fíggjarætlan fyri 2007/2008 - søkt verður um somu játtan sum seinasta ár kr. 437.900,00 + prístalsvøkstur.
Eisini verður søkt um kr.50.000,00 til breytasamstarvið sum er tað sama sum seinasta ár.

Mentunarnevndin mælir til at játtað Tofta skúla somu upphædd sum í inniverandi árið, sum er í samsvar við løgdu fíggjarætlanina fyri komandi ár, plus prístalshækkan.
Mentuanrnevndin mælir somuleiðis til at játtað Tofta skúla somu upphædd sum inniverandi árið kr. 50.000,00 til breytasamstarvið.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentunarnevndini viðv. fíggjarætlanini og breytasamstarvinum.

Avgerð: Tilmælini frá Mentunarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

Tofta skúli má eisini hava játtan til nýggja KT-tøkni. Eingin upphædd er ásett, men ein ynskilisti er gjørdur, og má skúlin innheinta tilboð.

Mentunarnevndin tekur undir við at skúlin er uppdateraður innan KT-tøkni, men at hon onki grundarlag hevur fyri at taka støðu til keyp av KT-tøkni, áðrenn tilboðini eru innkomin, og mælir tí til, at kommunan bíðar við at taka støðu til KT-keypið.

Bygdaráðið tók hetta sum kunning.

Søkt verður eisini um játtan til smærri innbúgv, nú flutt verður í nýggj hølir uppá kr.60.000,00

Mentunarnevndin mælir til, at Tofta skúli fær loyvi til at keypa tað neyðuga innbúgv, nú flutt verður í nýggj hølir.

Fíggjarnevndin mælir til, at skúlin fær upp til 40.000,00 kr. til smærri innbúgv.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 116/2007 Trivnaðarmál.**

Kommunan hevur søkt eftir barnsburðaravloysari í Barnagarðinum, og skuldu umsóknirnar vera inn kl. 12,00 mikudagin 19. okt.. - Inn komu tvær umsóknir
Barnagarðurin hevur gjøgnumgingið umsóknirnar og innstilla sum nr. 1.
Linda Jensen, Toftir

Trivnaðarnevndin viðgjørdi umsóknirnar og innstillingina frá leiðaranum á Barnagarðinum og mælir til, at Linda Jensen, við Rætt 4, Toftir, fær starvið.

Telefonfundur var 26.10.2007 um setanina og bygdaráðið samtykti at taka undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

Avgerð: Hetta var lisið upp á almenna fundinum og staðfest.

**Mál nr. 117/2007 Trivnaðarmál.**

Í skrivi dagfest 19.10.2007 vísa Stuðlar, sum eru í starvið hjá kommununi á, at neyðugt er við teldu sum arbeiðsamboð í stuðulsarbeiðinum í dagrøktini hjá kommununi.
Víst verður á ymisk ting sum eru at finna á internetinum og møguleikan at printa út og down loada spøl til børn við serligum tørvi.
Søkt verður um og mælt til, at ein telda við printara ið hava atgongd til internetið, verður sett upp í spælistovuni.
Tær biða um, at kommunan tekur støðu til áheitanina so skjótt sum gjørligt.

Trivnaðarnevndin tekur undir við at rættast hevði verið at keypa eina teldu til spælistovuna, til børn við serligum tørvi. Men áðrenn Trivnaðarnevndin kemur við nøkrum viðmæli, vil nevndin hava kanna, hvørji hesi børn hoyra undir og hvørjum stuðlarnir arbeiða undir.
Nevndin metir harumframt, at tann rætta mannagongdin í slíkum føri, er at leiðarin skal koma við umsóknunum um slík teldukeyp, í staðin fyri hvør einkultur stuðul.

Avgerð: Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var samtykt.

**Mál nr. 118/2007 Byggimál.**

Í umsókn dagfest 04.09.2007 søkir Petra Rasmussen, Saltnes, um byggiloyvi til sethús á grundstykki sítt matr. nr. 67b á Nesi.
Tekning dagf. 13.09.2007 er viðløgd.

Tekniska nevnd mælir til at játtað byggiloyvi eftir vanligum treytum, og at tekniska deild avsetur byggilinjuna.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 119/2007 Eykafíggjarlóg 2007**

Í 2007 hevur bygdaráðið samtykt at gera arbeiðir, sum ikki vóru, ella partvís ikki vóru á fíggjarætlanini fyri 2007.

Hesi arbeiðini eru:

| | |
|---|---|
| Havnaøki inni á Rætt | 2.400.000,- kr. |
| Øki omanfyri kommunuskrivstovuna | 300.000,- |
| Kommunuskrivstovan | 900.000,- |
| Gøtan niðan á Svangaskarð | 250.000,- |
| Sparkivøllur á Kvíggjarheyggi | 370.000,- |
| Moldgoymslan | 400.000,- |
| Blákrossheimið plus veg | 543.000,- |
| Lýarsvegur | 500.000,- |
| Projekt nýggj útstykking. | 518.000,- |
| Í alt | 6.181.000,- kr |
| Sum verður fíggja á henda hátt: | |
| Meirinntøka 2007 | 3.000.000,- |
| Tøkum peningi | 3.181.000, - |
| Í alt | 6.181.000,- kr. |

Fíggjarnevndin hevur endaliga viðgjørt eykafíggjarlógina og mælir til at hon verður samtykt - skal hava tvær viðgerðir í bygdaráðnum.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# Bygdaráðið